REIÐARAFELAGIÐ FYRI HANDILSSKIP
Shipowners of the Faroe Islands

LM-021/2026

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

Fylgiskjal 6

Fíggjarmálaráðið
Att.: Ruth Vang, landsstýriskvinna

Tórshavn 3. mars 2025

Áheitan um tillagingar í tonsaskattalógini

Reiðarafelagið fyri Handilsskip (RFH) vil gera vart við, at verandi avmarking í grein 4, stk. 2 í tonsaskattalógini um time-charter upp á tveir mánaðir avmarkar part av vanliga virkseminum hjá føroyskum reiðaríum.

Felagið heitir tí á landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, um at tillaga lógina og rætta tann skeivleika, sum verandi lógarorðing hevur við sær, so at føroysk reiðarí gerast meira kappingarfør.

Í 2020 og 2021 vórðu broytingar gjørdar í tonsaskattalógini eftir áheitan frá RFH. Samstundis var tað eitt politiskt ynski at tryggja, at útlendsk reiðarí ikki kundu gagnnýta skipanina uttan at vera skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni (FAS).

Harvið kom kravið um skráseting í FAS í grein 4, stk. 2.

Í 2021 varð orðingin um skráseting í FAS tillagað, soleiðis at onki krav er um skráseting í FAS, tá ið talan er um stutttíðar time-charter upp í til tveir mánaðir. Orsøkin til hesa broyting var at gera undantak, so at útlendsk skip kundu leigast við manning, meðan føroysku skipini fóru til klassing og smærri umvælingar.

Hetta undantak hevur síðani víst seg ikki at vera nøktandi.

Endamálið við broytingunum í 2020 og 2021 var at tryggja, at útlendingar ikki kundu útnýtta tonsaskattaskipanina. Tað var tó neyvan ætlanin, at hesar broytingar skuldu skapa avbjóðingar fyri føroysk reiðarí.

Nú er tó greitt, at tað er neyðugt at gera enn eina tillaging í lógini fyri at varðveita kappingarførið hjá føroyskum reiðaríum. Hetta verður lýst nærri niðanfyri.

Hví er neyðugt við broytingum?

1. Endurnýggjan av skipaflotanum
2. Umfatandi umvælingar
3. Nýtt virksemi

Viðv. 1 - Endurnýggjan av flotanum:

Endurnýggjan av skipaflotanum er natúrligur partur av virkseminum hjá reiðarii. Fyri at tryggja kappingarførið kann tað vera skilagott at selja eldri skip, um ein keypari bjóðar rætta prísin – eisini áðrenn nýbygningurin er liðugur.

Í slíkum førum kann tað verða neyðugt at leiga eitt skip inn fyri ávíst tíðarskeið, inntil nýggja skipið er klárt. Avmarkingin upp á tveir mánaðir til time-charter minkar munandi um fleksibilitetin hjá føroyskum reiðaríum í slíkum støðum.

Í síðsta enda kann hetta skerja kappingarførið munandi, tí avmarkaða tíðarskeiðið ger tað trupult at skipa sølu og skifti av flotanum.

Talan kann bæði vera um bygging av nýggjum skipi ella keyp av brúktum skipi. Í báðum førum kann levering verða avtalað fram í tíð, og tá kann verða fyrimunur at selja skipið beinanvegin, sum skal skiftast út, og leiga annað skip sum time-charter í bíðitíðini.

Viðv. 2 - Umfatandi umvælingar og/ella umbyggingar:

Um talan er um longri umvælingar, kunnu innleigað skip undir time-charter ikki gerast partur av tonsaskattalógini. Í flestu førum er neyðugt at fáa annað skip í rakstur, meðan skip skulu á skipasmiðju í longri tíð.

Hvørt innleigað skip verður leigað sum bare-boat ella time-charter veldst um, hvat slag av skipi er tøkt á leigumarknaðinum til at røkja ávísu uppgávuna. Avmarkingin upp á tveir mánaðir í tonsaskattalógini ger, at hetta slag av virksemi ikki verður fevnt av tonsaskattalógini, og tað er ein vansi fyri føroysk reiðarí.

Harumframt kann væntast, at størri umvælingar og/ella umbyggingar á skipum verða meira vanligar frameftir; serliga í sambandi við umlegging til grønar orkuloysnir. Hetta er neyðugt, fyri at handilsflotin skal lúka altjóða krøvini um netto-null útlát í 2050.

Tí er tað enn meira týdningarmikið at tryggja eina fleksibla lógargeving, ið stuðlar hesi menning.

Viðv. 3 - Nýtt virksemi

Um reiðarí vil royna nýggja rutu ella nýggjan vinnuveg, kann tað vera neyðugt at leiga skip sum time-charter. Í slíkum førum er avmarkingin upp á tveir mánaðir ikki nøktandi sum royndartíð, áðrenn felagið kann taka eina endaliga avgerð um møguligar íløgur í nýtt skip.

Tá ið RFH í 2021 gjørdi vart við tørvin á, at feløg skuldu hava møguleika at leiga skip sum time-charter í upp til tveir mánaðir, vóru hesar støður ikki nóg frammaliga í huga. Nú eru fleiri ítøkilig dømi um, at avmarkingin spennir bein fyri virkseminum hjá føroyskum reiðaríum.

Hetta hevur neyvan verið ætlaða endamálið við ásetingini.

Tilmæli:

Reiðarafelagið fyri Handilsskip (RFH) mælir Fíggjarmálaráðnum til at gera broytingar í tonsaskattalógini, so at skipanin tekur hædd fyri vanligum virksemi og rakstri hjá reiðaríum.

Felagið hevur tvey uppskot til broyting:

Uppskot 1:
Reiðarafelagið fyri Handilsskip mælir til, at eftir avmarkingina í grein 4, stk. 2, sum ásetur, at:
"*Hetta er tó ikki galdandi fyri stutttíðar time-charter í upp til 2 mánaðir.*"

Verður lagt afturat:

", ella um skipini strategiskt og handilsliga verða rikin úr Føroyum".

Orðingin í grein 4 kundi sostatt ljóðað (uppskot til broyting markað við reyðum):

§ 4. *Skattskyldug inntøka í sambandi við vinnuligt reiðarívirksemi við at flyta ferðafólk og góðs millum ymisk støð verður gjørd upp eftir reglunum í §§ 6-12 fyri:*

1) skip hjá reiðarínum, sbr. tó stk. 3,

2) skip sum verða leigað uttan manning, bareboat-charter, og

3) skip, sum verða leigað við manning, time-charter.

Stk. 2. Tað er ein treyt, at skipini eru 100 bruttotons, BT, ella størri, og at tey eru skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni, FAS, ella Føroya Skipaskráseting. Hetta er tó ikki galdandi fyri stutttíðar time-charter í upp til 2 mánaðir, ella um skipini strategiskt og handilsliga verða rikin úr Føroyum.

Uppskot 2:
Í staðin fyri, at verandi orðing ásetur eina avmarking upp á tveir mánaðir, kundi hetta verið broytt til fimm ár fyri betur at fevna um tær støður, sum eru lýstar omanfyri.
Reiðarafelagið fyri Handilsskip vónar, at landsstýriskvinnan og Fíggjarmálaráðið taka áheitanina til eftirtektar, so at føroysk rikin reiðarí framhaldandi kunnu verða partur av tonsaskattaskipanini – eisini í skiftandi tíðum.

Vinarliga
Reiðarafelagið fyri Handilsskip

Jórun Gardar